# Torusláttur órógvaði børn

**– Toran gongur, tá ið luftin er óstøðug, og tað ger sítt til, at nógv væta er í luftini. Hendan dagin var rættiliga lýtt í veðrinum, og tað gjørdist lýggjari, sum kvøldið leið. Samstundis kom ein kuldabrúgv inn yvir okkum við tí úrsliti, at tað var lýtt í neðra og kalt í erva. Undir slíkum umstøðum, fellir hitin skjótt uppeftir, og vit fáa snarljós og torusláttur, sigur Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur**

*- Tá ið toran gongur, er skilagott ikki at ganga undir trøum ella øðrum, sum stendur uppeftir. Slær snarljósið niður í trø, pelar ella antennur, kann tað eisini sláa niður í fólk ella djór, sum ganga undir hesum, sigur Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur*

TORAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Síðsta leygarkvøld var ógvusligur torusláttur um landið. Onkustaðni gekk toran ógvuliga hart á, og børn vóru órógvað og tordu illa at ganga ímillum húsini. So harður var tann eini bresturin, at hús á eystara armi á Skálafjørðinum meira at kalla skulvu. Fólk eru samd um, at tey ongantið áður hava hoyrt so harðan brest, tá ið toran hevur gingið.

Føroya Tele lýsti við, at tele-og sjónvarpssamskifti í onkrum øki var farið, tí toran hevði sligið niður í útbúnaðin.

### Hiti og kuldi

Sosialurin vendi sær til Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðing og spurdi hann, hví toran mundi gera so nógv um seg júst hendan dagin. Vit spurdu hann, hvat tað er, sum hendir, tá ið toran gongur.

– Toran gongur, tá ið luftin er óstøðug, og tað ger sítt til, at nógv væta er í luftini. Hendan dagin var rættiliga lýtt í veðrinum, og tað gjørdist lýggjari, sum kvøldið leið. Samstundis kom ein kuldabrúgv inn yvir okkum, soleiðis at tað var lýtt í neðra og kalt í erva. Undir slíkum umstøðum, fellir hitin skjótt uppeftir, og vit fáa snarljós og torusláttur.

Petur sigur, at tá ið buldrið kemur skjótt eftir snarljósið, er "útloysingin" beint uppi yvir, har tú ert staddur.

– Tað er snarljósið, sum ger skaða og ikki buldrið. Snarljósið kann oyðileggja el-útbúnað, seta eld á og annars gera skaða á tað, sum livandi er.

Hann sigur, at tá ið toran slær niður, sum vit rópa tað, er útloysingurin millum skýggið og jørðina. Í øðrum førum er hann millum tvey skýggj.

### Kraftmiklar ljóðbylgjur

Veðurfrøðingurin sigur, at tað er spenningurin millum skýggini og jørðina ella spenningurin millum tvey skýggj, sum útloysir snarljósið og buldrið.

– Talan er um stóran spenning, sum er nógv túsund volt, sigur Petur Skeel.

Hann vísir á, at sjálvt buldrið kemst av, at snarljósið, sum eru kraftmiklar ljóðbrygjur, ið gerast ógvuliga heitar, slær niður.

– Tá ið toran gongur, er skilagott ikki at ganga undir trøum ella øðrum, sum stendur uppeftir. Slær snarljósið niður í trø, pelar ella antennur, kann tað eisini sláa niður í fólk ella djór, sum ganga undir hesum, sigur Petur Skeel Jacobsen.

# Norrøna sløkti netið hjá Teletech

**Norrøna, sum liggur við bryggjuna á Bacalao, elvdi herfyri til, at nøkur viðskiftafólk hjá internetveitaranum, Teletech, mistu internetsambandið**

*Internetsambandið hjá Teletech niðan undir Varða í Havn bleiv burtur, tá ið Norrøna kom at liggja við vestaru bryggju. Tá ið veitarin fann út av, hvør trupulleikin var - og hevði flutt antennuna, var alt í lagi aftur*

INTERNET
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá ið toran seinasta leygarkvøld leikaði í av tí ringasta, mistu fólk í Vestmanna, Kvívík og Kollafirði internetsambandið hjá Føroya Tele, og sjónvarpssignalið reyk eisini.

### Norrøna sløkti

Men tað er ikki bara toran, sum megnar at gera seg inn á netið hjá ymisku veitarunum.

Tað megnaði nýggja Norrøna eisini, tá ið hon varð løgd við bryggjuna á Bacalao nakað eftir skaðan, hon fekk, tá ið hon fór á land.

Tá ið skipið varð lagt til eystaru bryggju, hendi tað, at internetsambandið hjá eitt nú Føroya Kolvetni, sum heldur til á Bryggjubakka, fór.

Veitari hjá Føroya Kolvetni er Teletech.

Birgir W. Høgnesen, sum starvast hjá Teletech, sigur, at Føroya Kolvetni misti netið, tí sambandið hjá Teletech niðan undir Varða í Havn bleiv burtur, tá ið Norrøna kom at liggja við vestaru bryggju.

### Fluttu antennuna

– So skjótt, vit funnu út av, hvør trupulleikin var, fluttu vit antennuna, og alt varð í lagi aftur, sigur Birgir W. Høgnesen.



RIMMAR ÚTSØLA
Byrjar fríggjamorgunin kl. 9.00

ÚTSØLA
ÚTSØLA
INNKAST
TEL 458222

ÚTSØLA
-50%
MASKULIN
TEL 456200

Ymiskar smykkur -50%
Holmgaard vørur & kikarar -50%
Eilif Arge
TEL 455164

Rammur & gávulutir
-20%
Bert hettar vikuskiftið
BLITZ
TEL 458900

ÚTSØLUVØRA
-50%
Onnur vøra - 20%
CHEAP
TEL 457921

ÚTSØLUVØRA
-50%
Lunell
TEL 457821

Leygardagin er opið til kl. 17.00
Handlarnir við sandin í Klaksvík